Spælibólkar

Í Skúlanum við Løgmannabreyt leggja vit stóran dent á, at næmingarnir skulu trívast í skúlanum, vitandi, at hetta er ein fyritreyt fyri, at næmingarnir læra. Sum liður í at skapa trivna og samstundis at fyribyrgja happing, hava vit valt at skipa fyri spælibólkum. ☺
Endamálið við at hava spælibólkar er, at styrkja um felagskapin í flokkinum. Næmingarnir koma í bólk saman við næmingum, ið tey ikki vanligani eru saman við, og fáa høvi at læra hvør annan betur at kenna. Tað er somuleiðis fyribyrgjandi ímóti happing, at børn vitja heimið og møta foreldrunum hjá hvør øðrum.

Tað eru umleið 6 næmingar í hvørjum spælibólki, 3 av hvørjum kyni. Um bólkarnir eru býttir upp eftir kyni, eru 4 - 5 næmingar í hvørjum bólki. Bólkarnir hittast 1-2 ferðir um mánaðin. Spælibólkarnir byrja eftir summarfrítíðina, og nýggir bólkar verða gjørdir eftir jólafrítíðina.

Ætlanin er ikki, at spælibólkurin skal vera eitt stórt tiltak, har skipað verður fyri bowling, bio, hestaríðing o.ø. ☺ - Heldur er ætlanin at uppliva ein vanligan dag heima hjá næminginum, har næmingarnir hugna sær saman. Tað er upp til hvørja einstøku familju, hvussu tey ynskja at halda spælibólkin, um næmingarnir verða við til døgurðan hjá familjuni, ella um tey hittast tíðliga og fara heim áðrenn døgurðatíð, og møguliga fáa ein drekkamunn. Tað er somuleiðis upp til familjuna, um tey spæla borðspøl, baka, hoppa í trampolin, spæla blikka ella annað. Tað er tó ikki ætlanin, at børnini skulu vera á nøkrum skermi (playstation, sjónvarp, telefon, o.a.) ☺
Bólkarnir verða sum heild settir soleiðis saman, at tey, ið vanliga fylgjast, ikki eru í bólki saman. Tað er tí sera gott, um foreldrini kunnu práta við barn sítt, áðrenn spælibólkin, um hvat tey kundu farið at gjørt saman. Tá ið spælibólkurin er, er somuleiðis umráðandi, at foreldrini eru við at tryggja, at børnini hugna sær, og at øll eru við.☺
Ynskiligt er, at foreldrini koma inn til ein kaffimunn, tá børnini verða heintað. Talan er her bert um at fáa heilsa uppá hvør annan aftur við einum kaffi-/temunni og møguliga eini (keyptari) smákøku afturvið. ☺ Samskiftið endiliga um hetta, so vertarnir vita, um tey kunnu vænta tykkum.

Tað er umráðandi, at foreldrini samskifta um, nær best liggur fyri at hava bólkin.
Um ikki liggur fyri hjá einari familju at hava bólkin í eitt tíðarskeið, mugu hesi geva boðini víðari til tann næsta í røðini, so bólkurin ikki steðgar upp.